## Íslendsk afturtøka

Tey seinastu árini hava íslendsk íløgufeløg sett nógvar pengar í danskt vinnulív, og millum feløgini, sum íslendingar hava sett pening í, kunnu nevnast flogfelagið Sterling og handilsketurnar Illum, Merlin og Ilva. Men nú er líkt til, at íslendingar hava hug at taka seg aftur úr Danmark, skrivar Børsen. Blaðið skrivar, at tað íslendska fíggjarmynstrið byggir á tætt samband millum bankar og vinnulív, og tí standa bankarnir eftir við rokningini, um íløgurnar miseydnast. Nú trýstir rentan bankarnar, og so taka íleggjararnir seg aftur.

## Fiskimenn endurgjald fyri brúgv

Í Svøríki hevur tann serligi Umhvørvisdómstólurin gjørt av, at felagið, sum eigur og rekur tað fasta sambandið um Oyrasund, skal rinda svenska ríkiskassanum endurgjald fyri tað, sum svenskir fiskimenn hava mist, tí Oyrasundsbrúgvin bleiv bygd. Dómstólurin sigur, at Øresunds Konsortiet skal rinda 55.000 danskar krónur um árið afturvirkandi til tað árið, byggingin byrjaði. Orsøkin er, at tað fasta sambandið fór við fleiri stórum gýtingarleiðum í Oyrasundi, sigur DR, sum ikki veit, um Øresunds Konsortiet fer at kæra dómin.



*Verkætlanin Miðlendi er í bíðistøðu. Her skitsutekning av verkætlanini, sæð frá Hvítanesvegnum niðan móti Eystara Ringvegi*

# Vit eru í bíðistøðu

**- Tað eru longu fleiri mánaðir síðani vit sendu inn umsókn um prinsippgóðkenning, men enn hava vit einki hoyrt frá kommununi, sigur Mads A. Winther, stjóri fyri verkætlanini Miðlendi**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað eru nú tíggju mánaðir síðani, at Mads A. Winther kunngjørdi stórfingna verkætlan uppi við Miðlon við Hoyvíksvegin.

Talan er um ein stórdepil, sum skal umfata eitt luksushotell í tíggju hæddum við øllum fasilitetum. Hotellið verður 40 metrar høgt og fer at hava 60 kømur. Hotellið skal hava fimm stjørnur og verður tað einasta í landinum á so høgum støði.

Aftrat hesum verður talan um matvøruhandlar, biografar, bowlinghøll, »steakhouse« og aðrar matstovur, umframt eina sonevnda vælverumiðstøð. Og sjálvandi verða børnini ansað undir tryggum og góðum umstøðum, meðan foreldrini gera síni ørindi í Miðlendi.

Talan verður um eina fullfíggjaða miðstøð við perkeringskjallara og innan dura gongugøtu.

Hendan verkætlanin varð almannakunngjørd í kjalarvørrinum av almannakunngerðini av Stórutjørn verkætlanini.

Men eins og seinni nevnda, tykist eisini Miðlendi verkætlanin at gerast ein tungur burður.

### Bíða eftir kommununi

- Tað eru longu fleiri mánaðir síðani, at vit sendu umsókn um prinsippgóðkenning inn til kommununa, men mær vitandi hevur hon ikki verið fyri enn, sigur Mads A. Winther, stjóri.

Hann sigur – eins og Bárður Nielsen segði um Stórutjørn – at býráðið var ógvuliga positivt mótvegis verkætlanini.

Tað er í fyrsta umfari kommunan, sum skal geva loyvi, og fyrr enn hetta loyvi er givið, ber ikki til hjá Miðlendi at sleppa víðari.

- Tað krevur uttan iva boytingar í viðtøkunum fyri økið, og eg veit ikki, hvussu nógvar instansir málið skal ígjøgnum, men tað er á tí støðinum, vit eru í løtuni, sigur Mads A. Winther.

Tá verkætlanin varð almannakunngjørd tíðliga í desember varð roknað við, at spakin kundi verið settur í eitt ár seinni. Og hóast tað dregur út við loyvunum, so hevur Miðlendi ikki justerað tíðarætlanina.

- Vit sleppa ikki víðari, fyrr enn vit hoyra aftur frá kommununi. Men tá loyvini fyriliggja, kunnu vit fara skjótt til verka. Og talan kann jú gerast um fleiri byggistig, sigur Mads A. Winther.

### Drúgv tíð enn

Men tað liggur púra greitt, at tað verður eingin spaki settur í í ár. Tí tá ein prinsippgóðkenning fyriliggur frá býráðnum, skulu endaligu projekteringarnar gerast. Og síðani skal verkætlanin leggjast alment fram, og har skulu hon liggja í minst tríggjar mánaðir.

- Vit eru í løtuni í einari bíðistøðu og sleppa ikki víðari, fyrr enn vit hoyra aftur frá býráðnum. Tá vit spyrja okkum fyri har fáa vit at vita, at teir hava so nógv at gera, og tað passar helst, sigur Mads A. Winther.

Kortini hava teir ikki broytt tíðarætlanina.

- Nei, tað hava vit ikki. Og verkætlanin kann jú fremjast í trimum ella fýra stigum. Fyrsta stig kann til dømis verða at sambyggja Miðlon við Grón, og tað er nakað, ið kann gerast skjótt, sigur Mads A. Winther.

Tá verkætlanin varð almannakunngjørd fyri tíggju mánaðum síðani segði Mads A. Winther, at stórur áhugi var millum íleggjarar fyri verkætlanini. Og hóast fíggjarliga støðan er broytt síðani tá, er áhugin ikki broyttur.

- Nei, tað er framvegis stórur áhugi fyri verkætlanini, bæði í Føroyum og uttanlands, so í tann máta er støðan einki broytt, sigur Mads A. Winther.

Men enn bíðar verkætlanin eftir kommununi, og spurningurin er so bert, hvussu leingi hon má bíða.